# VIÐTØKUR

# EIN TÍMI UM ÁRIÐ

***§ 1. Navn og heimstaður***
Verkætlanin ber heitið ”Ein tími um árið” við heimstaði í Tórshavn.

Verkætlanin hevur heimasíðu: www.eintimi.com.

***§ 2. Endamál***
**Stk. 1.** Um heystið á hvørjum ári velur verkætlanin at stuðla einum ella fleri vælgerandi endamálum. Tann 1. februar skipar verkætlanin fyri innsavnan av tímalønum frá fyritøkum og privatpersónum. Alt yvirskotið frá verkætlanini fer óskert til tey vælgerandi endamálini sum innsavningin varð tilætlað.

**Stk. 2.** Verkætlanin kann ikki eiga pening ella aðrar ognir, heldur ikki upptaka lán ella skylda triðjamanni pening.

***§ 3. Fyristing***
**Stk. 1.** Verkætlanin verður fyrisitin av Ásu Andreasen, ábyrgdarpersóni.

**Stk. 2.** Roknskaparárið er frá 1. januar til 31. desember.

**Stk. 3.** Grannskoðari er Sp/f Grannskoðaravirkið *INPACT*, løggilt grannskoðaravirki.

***§ 4. Skyldur***
**Stk. 1.** Ábyrgdarpersónurin skal virka fyri at fremja tað, ið er í tráð við endamálsorðingina hjá verkætlanini (§2).

**Stk. 2.** Grannskoðaður ársroknskapur, sum verkætlanin hevur sett upp, verður lagdur á heimasíðuna.

***§ 5. Avtøka***
Verður verkætlanin avtikin fara ognir tess til eitthvørt vælgerandi endamál, ið er í tráð við endamálsorðingina hjá verkætlanini (§2).

Tórshavn, tann 5. januar 2010